# Set hjálmin rætt!

**Súkkluhjálmurin skal kennast væl á høvdinum og hava hóskandi stødd. Neyðugt kann vera at royna fleiri ymisk snið, áðrenn tú finnur ein hjálm, sum er hóskandi til tín.**

Hjálmurin skal sita at kalla vatnrættur á høvdinum. Umleið tveir cm skulu vera frá eygnabrúnum til kantin á hjálminum framman.

Teir báðir stropparnir báðu megin við skulu savnast í síðuspenninum beint undir oyralippuni og ikki niðri við høkuna.

Hevur hjálmurin fingið ein harðan stoyt, skal hann skiftast út, eisini hóast tú ikki sært, at hann er brotin.

Hjálmurin skal skiftast út, tá hann er ov lítil til at verja høvdið.

Hjálmurin skal bert nýtast, tá tú súkklar. Tað kann vera vandamikið at til dømis klintra í trøum og spælistativum við súkkluhjálmi á høvdinum, tí hann kann gerast fastur.




Stropparnir skulu ikki spennast heilt fastir, men heldur ikki sita leysir. Pláss skal einans vera fyri at fáa tveir fingrar millum stropparnar og høkuna.

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK